

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 12 - 2012

# Fleiri feløg klár til Grønland

Nú grønlendska Landstingið hevur samtykt lógarkarmarnar um stórar vinnuverkætlanir, eru fimm fyritøkur til reiðar ella næstan til reiðar at fara undir námsverkætlanir í Grønlandi. London Mining hevur latið landsstýrinum í Nuuk umsókn um námsvinnu í Isukasia, fyritøkan Tanbreez hevur søkt um loyvi til at leita eftir sjáldsomum evnum í Killavaat, og True North Gems hevur latið landsstýrinum umsókn um loyvi til at leita eftir rubinum nærhendis Qeqertarsuatsiaat. Herumframt roknar landsstýrið við, at fyritøkan Ironbank fer at søkja um loyvi til at grava eftir blýggi og zinki í Citronenfjord í Landnyrðingsgrønlandi, og so hevur Grrenland Minerals and Energy víst áhuga fyri at leita eftir sjáldsomum evnum í Kvanefjaldet við Narsaq. Andstøðuleiðarin í Landstinginum, Siumut-forkvinnan Aleqa Hammond, róði fram undir, at tað vóru tær stóru útlendsku fyritøkurnar, sum gjørdu av, hvussu skjótt Landstingið skuldi avgreiða lógarkarmin. Men hesum vísti landsstýrismaðurin í vinnu- og ráevnamálum, Ove Karl Berthelsen, aftur. Landsstýrismaðurin hevur tó sagt, at hevði Landstingið útsett ta endaligu viðgerðina av lógarkarminum til í vár, kundi London Mining fingið trupulleikar við sínari verkætlan.